Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

upp á

§52a fyrispurning nr. 9/2019 frá Ingilín D. Strøm, løgtingskvinnu, viðvíkjandi veðurlagslóg og CO2-útláti

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta ítøkilig tiltøk í verk til tess at lækka føroyska útlátið fram móti 2030?

2. Um so er, hvørji tiltøk ætlar landsstýrismaðurin at seta í verk og nær?

3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera eina veðurlagslóg við nágreiniligum útrokningum, tíðarásetingum og ætlanum sum t.d. klimaloven, sum er í umbúna í Danmark?

Svar:
Til spurning 1
Grøna umskiftið er ein høvuðsavbjóðing, sum samgongan tekur í størsta álvara. Stríðið ímóti veðurlagsbroytingunum er ein heimsfevnandi uppgáva, og Føroyar skulu sjálvsagt eisini taka ábyrgd og vera við til at minka útlátið. Samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at føra ein framfýsnan orku- og umhvørvispolitikk, sum livir upp til altjóða krøv.

Í samgonguskjalinum verður víst á ítøkilig átøk, ið hendan samgongan vil fremja fyri at minka føroyska útlátið næstu árini. Eisini skulu Føroyar hava nýggjan veðurlagspolitikk í næstum. Verandi veðurlagspolitikkur frá 2009 gongur fram til 2020, og hann skal nú endurskoðast, og nýggj mál skulu setast fram til 2030. Hetta verður eitt grundarlag hjá Føroyum at arbeiða eftir á veðurlagsøkinum næstu 10 árini, og við Parísavtaluni hava Føroyar bundið seg til at seta sær framsøkin og realistisk mál fyri at skerja útlátið fram til 2030.

Heimsins lond stremba eftir, at einki nettoútlát av vakstrarhúsgassi verður í 2050, og í Føroyum skal eisini áhaldandi stýrast eftir hesum málinum.

Til spurning 2
Nógv og fjølbroytt tiltøk skulu til fyri at fremja grøna umskiftið, og í hesum sambandi verða nøkur teirra umrødd.

Í fyrsta lagi skal munandi meira ferð setast á framleiðsluna av grønari orku. Í næstum verður vindorkuframleiðslan økt munandi, úr 18 MW upp í umleið 60 MW, og vindorkuframleiðslan skal økjast enn meira næstu árini. Málið er, at útivið øll elorka skal vera framleidd úr varandi orkukeldum í 2030. Tað gerst bara við størri íløgum í framleiðsluverk, goymslur og netútbyggingar.

Eisini er neyðugt at fáa orkunýtarar at leggja orkunýtsluna um. Ein høvuðsliður í hesum er at fáa størri kapping á framleiðslu- og sølusíðuni. Farið er undir fyrireikingarnar at skilja elnetið hjá SEV frá hinum virkisøkinum, so privatar fyritøkur fáa møguleika at leiga og framleiða seg inn á elnetið, og síðani selja.

Oljunýtslan til upphiting skal minkast, so fleiri sethús og bygningar verða upphitað við varandi orkukeldum. Ein orsøk til, at fólk eru so sein at flyta yvir til varandi orku, er kostnaðurin. Tað er tí neyðugt, at ein óheft ráðgeving verður skipað, so fólk kunnu fáa upplýsingar, uttan at søluáhugamál eru inni í myndini. Eisini er ætlanin at leingja skipanina við endurrindan av meirvirðisgjaldi fyri keyp og uppsetan av elriknum hitapumpuskipanum.

Nærum helmingurin av føroyska útlátinum kemur frá skipum. Í Føroyum skulu vit beinanvegin seta tiltøk í verk fyri at tálma útlátið frá skipum. Enn eru avmarkaðir møguleikar at skerja útlátið á sjónum uttan beinleiðis at minka fiskiskapin. Strembast skal eftir, at útlátið á sjónum verður skert 50 prosent í 2050 í mun til útlátið í 2008, sum felagsskapurin fyri altjóða sigling, IMO, mælir til. IMO fokuserar serliga á altjóða handilsflotan, men roknast kann við, at fiskiskip sum frálíður fáa gagn av tøkniligu menningini á økinum. Í fyrsta umfari er týdningarmikið, at føroyski flotin verður støðugt endurnýggjaður, so vit fáa nýggj skip, ið dálka munandi minni enn tey eldru. Í samgonguni eru vit sannførd um, at góðir og støðugir karmar fyri fiskivinnuna eru við til at endurnýggja flotan.

Sum nevnt er fráboðað, at Føroyar taka undir við Parísavtaluni, og tað vil siga, at komandi føroyski veðurlagspolitikkurin skal dagførast og endurskoðast samsvarandi avtaluni. Vónandi fer politiska skipanin í felag at seta sær framsøkin og realistisk mál við einari breiðari semju um nýggjan veðurlagspolitikk. Í summar fekk fyrrverandi landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum handað uppskot um endurskoðaðan veðurlagspolitikk, sum støði kann takast í.

Til spurning 3
Ætlanin er ikki at gera eina veðurlagslóg, men hinvegin er í umbúna at gera ein veðurlagspolitikk, sum setur mál fram til 2030. Veðurlagspolitikkurin ásetur millum annað í prosentum, hvussu nógv Føroyar stremba eftir at minka útlátið næstu 10 árini, og hvussu ætlanin er at røkka hesum málinum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 28. oktober 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður